# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 130 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðuroyki, Miðøki og Suðuroyki halda til í ávikavíst Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Miðøki, har viðkomandi kemur at starvast, eru 52 starvsfólk.

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail: tollskatt@tollskatt.fo

## Eftirlitsfólk

**Søkt verður eftir eftirlitsfólkum til Toll- og Skattstovu Føroya, Miðøki, til at byrja 1. mai ella skjótast til ber.**

**Vit vanta at tú**
hevur eina útbúgving frá hægri lærustovni, so sum HA, HD, Cand. Merc. Aud. ella líknandi útbúgving innan rokniskap. Eisini vanta vit at tú ert arbeiðssamur, fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni. Viðkomandi arbeiðsroyndir hava eisini okkara áhuga.

**Uppgávurnar hjá eftirlitsfólkunum verða m.a:**

- at fremja eftirlit og grannskoðan av skatti, meirvirðisgjaldi og tolli
- at vitja fyritøkur
- at málsviðgera
- at gera váðametingar
- at ummæla kærumál og dómsmál

**Vit kunnu bjóða**
Eitt áhugavert og fakligt mennandi starv við nógvum avbjóðingum. Góðir møguleikar eru eisini fyri eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Setanarøki**
Setanarøkið er Miðøki, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Umsóknir**
Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Eyðun Joensen, deildarleiðara, ella til Vilhjálmur Gregoriussen, økisstjóra, á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir skal vera Toll- og Skattstovu Føroya í hendi í seinasta lagi: 10. apríl. 2007.

*15. mars. 2007*

**Toll- og Skattstova Føroya**
Miðøki
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

# KRAN E

Lastvognsásettur krani yvir 25 tonsmetur

Skeið byrjar mánakvøldið 19. mars kl. 18

Tilmelding á tel. 31 62 22

Vinnukortið




# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI
TEKNISKI SKÚLIN

## Leiðslumenning
## vár 2007

**Coaching — hold 6**
**24 tímar 19; 20. apríl 23. mai , kl. 09.00-16.00**
Seinastu árini er vorðið alt greiðari, hvussu umráðandi tað er, at leiðarin kennir coach-amboðini.
Við tí professionellu samrøðuni sum amboð lærir leiðarin at arbeiða tilvitað við menning av sínum starvsfólkum. Øll kunnu læra at gerast ein góður coach.
**Tilmelding: áðrenn 5. apríl 2007**

**Grundleggjandi leiðaraútbúgving — hold 10**
**96 tímar 30. apríl; 1; 2. mai 21; 22. mai 20; 21; 22. aug. 17; 18. sept., kl. 09.00-16.00**
Útbúgvingin vendir sær til nýggjar og komandi leiðarar. Vilt tú hava eitt størri leiðslufakligt støði, so er útbúgvingin nakað fyri teg. Royndir leiðarar, sum hava fingið nýggjar arbeiðs- og leiðslufunktiónir kunnu eisini taka hesa útbúgving.
**Tilmelding: áðrenn 16. apríl 2007**

**Persónlig førleikamenning — hold 3**
**24 tímar 2; 3. mai. og 8. juni, kl. 09.00-16.00**
? Hevur tú skil á tínum egnu sterku síðum?
? Hevur tú eina mynd av, hvussu onnur uppliva teg?
? Sjálvsálit í tín virkisstíl og førleikar økir um tín møguleika at virka betur.
Skeiðið gevur tær eina mynd av tínum persónligu førleikum og hvørja atferð ein oftast velur - og íblástur, ítøkilig amboð og persónliga sparring til virkni og menning.
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2007**

**KVIK- temadagur**
**8 tímar 9. mai kl. 09.00-16.00**
**KVIK - sjálvseftirmeting í praksis, leiklutur og uppgávur hjá "toghaldarum"**
KVIK er eitt góðskuamboð til menning, nýskapan og førleika. Temadagurin gevur góð ráð til design og fremjing av sjálvseftirmetingini og ger "toghaldaran" føran fyri at taka sær av teimum uppgávum sum mannagongdin krevur.
**Innihald**
? Tilrættaleggjan av mannagongd fyri sjálvseftirmetingina
? Fremjan av ymisku stigunum í sjálvseftirmetingini
? Avbjóðingar í "toghaldara" leiklutinum, herundir góð ráð til býti av leiklutum og uppgávum
**Málbólkur**
"Projektleiðarar og toghaldarar" í einari sjálvseftirmetingarmannagongd, bæði nýbyrjarar og meira von. Temadagurin er eisini týðandi fyri leiðarar á fakligum felagsskapum og málsviðgerum, ið arbeiða við strategiskari førleikamenning.
**Skeiðleiðarar frá Statens Center for Kompetence- og Kvalitetsudvikling, lesið meira á www.sckk.dk.**
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2007**

**KIP - temadagur**
**8 tímar 10. mai kl. 09.00-16.00**
**KIP - Førleikamenning í praksis**
Temadagurin gevur tær góð ráð, um tú ert í ferð við at leggja eina strategi fyri førleikamenning. Ella, um tú hevur tørv á hugskotum til, hvussu strategiin verður brúkt í praksis, ella um tú hevur tørv á íblástri til MUS.
**Innihald**
? Menning av organisatoriskum førleikum fyri at eydnast í praksis
? Læringsumhvørvi hvat og hvussu?
? Førleikastrategi
? MUS sum liður í førleikamenningini
**Málbólkur**
Leiðarar, starvsfólkaleiðarar,fakfelagsleiðarar, HR starvsfólk, málsviðgerar.
**Skeiðleiðarar frá Statens Center for Kompetence- og Kvalitetsudvikling, lesið meira á www.sckk.dk.**
**Tilmelding: áðrenn 18. apríl 2007**

**Innanhýsis skeið**
Innanhýsis skeið verða skipað í tøttum samstarvi við kundan. Fyrimunir við innanhýsis skeiðum eru m.a., at kundin hevur møguleika sjálvur at velja evni, tíð og stað
? undirvísingin er tillagað tørvin hjá luttakarunum, stovninum ella fyritøkuni
? uppgávur og dømi frá gerandisdegnum verða nýtt
? innanhýsis skeið eru bíligari fyri hvønn luttakara

**Lesið meira um skeiðini á www.skeidsdepilin.fo ella ringið 318813, tilmeldast kann beinleiðis á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeidsdepilin.fo